# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Karla Hansen 80 ár



Í morgin, mikudagin 6. september, verður Karla Hansen í Saltangará 80 ár. Føðingardagin er hon burturstødd.

Karla er ættað úr Sørvági. Foreldrini vóru Christina og Jóhannes Joensen úti á Lið. Børnini hjá teimum eru Louis, sum búði í Sørvági, Gigga Mouritsen, Oluffa Mouritsen og Poul Arni í Havn, Kristoffur á Argjum, Karla og Lea Hansen, sum býr í Sørvági. Louis er ikki á lívi longur.

Sum blaðung fór Karla til Havnar at tæna. Tað var meðan hon var í Havn, at hon møtti Símuni Hansen av Toftum. Hann og beiggi hennara, Kristoffur, gingu upp á skúla saman og vóru vinmenn.

Tá ið Karla var komin at kenna Símun, fór hon inn á Nes, har hon tænti á Torkilsheyggi. 15. desember í 1946 giftust Karla og Símun inn hjá foreldrum hansara, sum vóru Sanna og Andreas Hansen í Túni á Toftum.

Í 1950 fluttu Karla og Símun inn í Heiðar, har Símun hevði bygt húsini, sum arbeiðarafelagið Hæddin nú eigur. Tey stóðu so einsamøll tá. Símun var leiðari í Føroya Banka, og bankin helt til í norðara enda av húsunum. Samstundis var Símun vinnulívsmaður. Hann fór undir fiskavirkið Lynfrost, hann seldi tunnur og gørn og fekst við so mangt annað, meðan Karla tók sær av heiminum og børnunum.

Børnini hjá Karlu og Símuni eru Jóannes (1947), Sanna (1951), Andrias (1955), Kristina (1958), Andriása (1959) og Kára (1961). Andrias doyði av vanlukku nýggjársaftan 1958.

Í 1960 flutti familjan út á Mýrarnar, har Símun hevði latið húsini byggja, sum nú eru sambýli við Toftavatn. Har trivust tey væl, og har kom nógv fólk á gátt. Longu 18. mai í 1968 doyði Símun av sjúku. Hann var 45 ára gamalur.

Karla sat einkja 41 ára gomul. Hon fór tá út at arbeiða. Fyrst var hon í fleiri ár á Sjómansheiminum, so var hon í Lynfrost, og síðani var hon í Ólastovu, sum Jona og Óla Christian Danielsen, ið Karla altíð hevur havt tætt samband við, áttu.

Eitt skifti búðu Karla og hennara í íbúð í húsunum, sum Pól Knudsen hevði latið byggja omanfyri vegin, har Statoil støðin nú er. Nú eru næstan fjórðings øld liðin, síðani Karla flutti í hugnaligu húsini, sum hon eigur í Grannatúni, og har býr hon framvegis.

Hjá Karlu og hennara var tað aftur stór sorg, tá ið Kristina brádliga gjørdist sjúk og doyði longu 6. september í 1984.

Jóannes, Andriása og Kára búgva í Saltangará, og Sanna býr í Rókini í Saltnesi.

Karla er stillfør, blídlig og fyrikomandi, og hon hevur eitt lætt sinni. Hon hevur verið trúgv móti familjuni og verfamiljuni, og ikki minst hava hon og svigarinnurnar Liss og Maja verið ógvuliga góðar.

Í samkomuni í Berøa hevur hon verið frá tí fyrsta, at húsið varð reist fyri meiri enn fjøruti árum síðani. Tey seinnu árini hevur hon verið millum teirra, sum hava syrgt fyri, at klæði hava verið send til Rumenia.

Karla eigur 17 ommubørn og tríggjar langommudøtrar. Tær búgva allar í Keypmannahavn, og 80 ára føðingardagin er Karla saman við teimum og fleiri ommubørnum.

J

†

### Andlát og jarðarferðir

**Sanna Lisberg í Vági** fer til gravar úr Vágs Kirkju mikudagin kl. 12.30. Tey, ið ynskja at minnast Sannu kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina peningagávu, konto í Peningastovnunum.

**Jona Henriksen, Tórshavn**, andaðist á Ellisheiminum mánadagin 4. september, 82 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin 7. september kl. 13. Tey, ið vilja minnast Jonu kunnu lata KFUK eina gávu. Konta í Føroya Sparikassa.

**John (Jon) Dánjal Pauli Ludvig**, vanliga nevndur **Jobburin, úr Vági**, búsitandi í Hanstholm, andaðist í heiminum leygardagin 2. september, 56 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Ræhr kirkju við Hanstholm mikudagin 6. september kl. 13.

Kistan við **Sannu Lisberg í Vági** fer suður við Smyrli mánadagin 4. september klokkan 10. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju mikudagin kl. 12.30. Tey, ið ynskja at minnast Sannu Lisberg, kunnu latað Føroya Felag móti Krabbameini eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

Sosialurin

## Jona Henriksen deyð



Mánadagin 4. september andaðist Jona Henriksen á Ellisheiminum í Havn, 82 ára gomul.

Jona Henriksen var ein sera virkin kvinna á so mongum økjum. Umframt sítt virksemi í KFUK, so var hon bæði býráðs- og landspolitikari umframt fleiri álitissessir.

Jona fevndi víða og var kend og vællýdd, verið tað seg á politiska økinum ella í kristiligum felagslívi.

Jona varð fødd í Havn 4. januar í 1924, var elst av teimum fimm børnunum hjá Elisabeth, f. Mouritsen, og Palla Henriksen í Havn. Systkini eru: Kirstin, Jákup (sáli), Andrias og Arnold

Sum ung tók hon studentsprógv, og var hon millum teir fyrstu næmingarnar á VBV.

Jona var útbúgvin í Føroya Banki og arbeiddi har frá 1950-67. Síðan var hon KFUK-skrivari í 30 ár – frá 1967 til hon legði frá sær í 1997.

Var býráðslimur fyri Javnaðarflokkin í Havn frá 1969 til 1972, og á løgtingi var hon fyri Javnaðarflokkin í seks ár, fyrst sum varafólk frá 1975-78, og í 1978 var hon vald á ting. Hon var fyrsta kvinna sum hevði fast sæti á løgtingi.

Jona var limur í Føroya Kirkjustjórn, Føroya Skúlastjórn, Útvarpsnevndini og í stýrinum fyri Landssjúkrahúsið.

Jona var býarmyndin, sum dugdi sera væl at vera millum fólk – flestu komu á tal við hana í gerandislívi sum í felagslívi.

Hennara fasta støði var arbeiðið ið KFUK stóð fyri – og tað var ikki tann serligi dagurin hjá skótunum, har hon ikki stóð á odda.

Jona hevði dygdir, sum hon eisini gav frá sær á sín serliga hátt. Meiningar sínar gav hon eisini til kennar – oftast við brosi á kinn, hon vildi so fegin, at øll skuldu føla seg væl, hóast áskoðanir kundu ver ymiskar.

Hon dugdi at vera glað saman við teimum glaðu og gráta saman við teimum grátandi, hevði eina nátúrliga virðing fyri øðrum hugsandi, gjørdi ikki mun á fólki.

Síðstu tvey árini var Jona á Ellisheiminum í Havn.